## Lata nú eisini virðislønir fyri film

**Norðurlendsku ráðharrarnir í mentamálum hava nú samtykt at lata eina norðurlendska filmsvirðisløn**

NORÐURLANDA-RÁÐIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Norðurlandaráðið hevur nú í nógv ár latið virðislønir til serlig avrik á ymsum økjum. Í fleiri ár hevur Ráðið latið bókmentavirðisløn, tónlistavirðisløn og natúru- og umhvørvisvirðisløn.

Men á ráðharrafundi í Keypmannahavn mikudagin, samtyktu ráðharrarnir, at hereftir skuldi Norðurlandaráðið eisini lata eina filmsvirðisløn.

Tað sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, sum var við á fundinum.

Hann sigur, at filmsvirðislønin verður latin fyrstu ferð næsta ár og hon verður uppá 350.000 danskar krónur og hon verður sostatt á hædd við hinar virðislønirnar

– Norðurlendsku ráðharranir í mentamálum eru samdir um, at filmslistin blómar í Norðurlondum og at tað tískil eisini er vert at heiðra, góð norðurlendsk filmslistafólk.

Higartil hevur Norðurlandaráðið latið filmsvirðisløn eina ferð. Tað var tá ið finski leikstjórin, Aki Kaurismaki fekk virðislønina fyri filmin »Maðurin við ongum minni« fyri nøkrum árum síðani.

Smálutirnir eru ikki heilt greiðir enn, men talan skal vera um ein norðurlendskan film, men tað er ikki heilt avgjørt enn, um filmurin skal vera á norðurlendskum máli fyri tað, tí ført var fram, at góðir, norðurlendskir filmir kunnu eisini vera á fremmandum málum.

## Skulu síggja sjónvarp hjá hvørjum øðrum

**Nú er nýtt lív blást í ætlanin um, at fólk í norðurlondum skulu kunna síggja sjónvarspsrásir hjá hvørjum øðrum**

NORÐURLANDA-RÁÐIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fólk í einum norðurlandi skulu kunna síggja sjónvarpsrásirnar hjá hinum norðurlondunum.

Hetta hevur verið á dagsskrá í Norðurlandaráðnum í næstan ein mansaldur.

Seinastu árini hevur ikki so nógv verið at hoyrt til hesa ætrlanina. Men eftir norðurlendska ráðharrafundin í Keypmannahavn mikudagin, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, at nú er nýtt lív blást í hesa ætlanina.

Málið var frammi á ráðharrafundinum hesuferð, og har varð greitt frá, at arbeitt verður aftur við málinum.

– Ráðharraráðið er ógvuliga áhugað í at fáa eitt slíkt sjónvarpssamstarv í lag og ætlar at arbeiða víðari við tí.

Málið skal nú sendast teimum ymsu sjónvørpunum í Norðurlondum til hoyringar og so skal tað takast uppaftur seinni í ár. Men tað eru nógvir tekniskir spurningar at loysa. Aðrir spurningar eru, hvørjar rásir, talan skal vera um og, hvussu verður við gjaldi, tí sum er, kunnu fólk síggja nógvar norðurlendskar rásir umvegis fylgissvein, bara goldið verður fyri tað.

## Samstarv um friðalig telduspøl

NORÐURLANDA-RÁÐIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

À fundinum í norðurlendska ráðharraráðnum í Keypmannahavn mikudagin, varð eisini tosað eitt sindur um telduspøl.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, sigur, at norðurlendsku ráðharrarnir í mentamálum stúra fyri gongdini, nú telduspøl verða alsamt harðligari og harðligari og á fundinum varð eitt sindur tosað um at skipa eitt samstarv ímillumNorðurlond um at menna friðalig telduspøl, sum børnum dáma sum eina mótvekt ímóti teimum harðligu spølunum, børnini, sum nú eru frammi.

# Kemur heim við aftur við 600.000 krónum í lummanum



*Jógvan á Lakjuni saman við mentamálaráðharrum úr øðrum norðurlondum. Frá vinstru eru teir Brian Mikkelsen úr Danmark, Henriette Rasmussen úr Grønlandi, Valgerd Svarstad Haugland úr Noregi, Thorgerður Katrin Gunnarsdóttir úr Íslandi, Jógvan á Lakjuni úr Føroyum og Marita Ulvskog úr Svøríki. Tanja Karpela úr Finnlandi var ikki við á fundinum.*

*Mynd: Símun J. Hansen*

**Jógvan á Lakjuni hevði 600.000 krónur við sær í lummanum til føroyska mentan, tá ið hann kom aftur av fundi í norðurlendska ráðharraráðnum í gjár**

NORÐURLANDA-RÁÐIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sekshundraðtúsund krónur!

Tað var tað, sum Jógvan á Lakjuni, lands-stýrismaður, hevði við sær í lummanum, nú hann í gjár kom aftur úr Danmark.

Og hetta er peningur, sum skal brúkast til mentan í Føroyum.

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur verið á síni fyrstu uttanlandsferð. Leiðin gekk til Danmarkar og ørindini vóru at hitta mentamálaráðharrarnar úr hinum norðurlondum á fundi. Hetta var ein fundur, sum var í sambandi við Norðurlandaráðið og hesuferð var tað ráðharraráðið fyri mentan, sum hittist í Keypmannahavn.

Endamálið við hesum fundinum í ráðharraráðnum var at leggja fíggjarætlanina fyri næsta ár í sambandi við tað fjølbroytta mentanarliga virksemið, sum er undir Norðurlandaráðnum.

Jógvan á Lakjuni sigur, at eitt uppskot, sum varð á fundinum, var at hækka játtanina til norðurlandahúsini í Føroyum, Grønlandi og í Íslandi.

Ráðharrarnir samtyktu at skjóta upp fyri Norðurlandaráðnum at hækka játtanina til norðurlandahúsini 1,6 millión.

Burturav hesum, fær Norðurlandahúsið í Føroyum 600.000 krónur.

Jógvan á Lakjuni vísir tó á, at talan er um eitt uppskot og at fíggjarætlanin hjá Norðurlandaráðnum verður ikki endaliga samtykt, fyrrenn á fundi í ráðnum í heyst.

– Men aloftast verða uppskotini frá teimum ymsu ráðharraráðnum fylgd, sigur hann.

Sostatt er alt, sum bendir á, at Norðurlandahúsið í Føroyum fær 600.000 krónur meiri at ráða yvir næsta ár, afturat teimum 10,1 milliónunum, sum Norðurlandahúsið í Føroyum fær frá Norðurlandaráðnum í ár.

– Sostatt má staðfestast, at tað er ikki sørt av stuðuli, sum Føroyar fáa frá Norðurlandaráðnum, so tað hevur alstóran týdning, at vit eru við í hesum samstarvinum, sigur landsstýrismaðurin í mentamálum.

Hann hevur annars tað fatan, at hini norðurlondini eru ógvuliga vælviljað at stuðla ymsum tiltøkum í Føroyum og øðrum smálondum í Norðurlandaráðnum.

Sum heild verður annars skotið upp at játtanina hjá Norðurlandaráðnum til mentan næsta ár, skal verða tann sama sum í ár, men talan verður altso um nakrar forskjótingar.

Jógvan á Lakjuni sigur, at tilsamans er fíggjarætlanin hjá Norðurlandaráðnum uppá 800-900 milliónir. Av teimum verða 160 milliónir brúktar til mentanarlig endamál.



*Danski mentamálaráðharrin, Brian Mikkelsen og Jógvan á Lakjuni*

*Mynd, Símun J. Hansen*



*Her sita norðurlendsku ráðharrarnir fyri mentan við embætisfólkum sínum á fundi í Keypmannahavn mikudagin*

*Mynd: Símun J. Hansen*



**Hugtakið at vera nøgdur finst ikki í míni verð. Tí tú mást alla tíðina stríðast fyri at koma víðari og gera tað enn betur - tað er sjálvt grundarlagið undir allari framdrift og kreativiteti, sigur fremsti føroyski produsarin, Óli Poulsen, sum hevur verið við frá byrjan við nýggju fløguni hjá Lenu Andersen. Leygarkvøldið trínur hann á føroyskan pall fyri fyrstu ferð í nærum 17 ár.**

TÓNLEIKUR
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*Óli Poulsen er produsari á fløguni "Can't Erase It" hjá Lenu Andersen. Í hesum døgum er hann í Føroyum, har hann millum annað skal vera við á útgávukonsertunum um vikuskiftið*

# Passiónin er drívmegin

Í samband við fløguútgávuna "Can't Erase It" hjá Lenu Andersen er navnframasti føroyski produsarin, Óli Poulsen, komin til Føroya.

Til ber at siga, at hann fylgir fløguni allan vegin heim, tí á útgávukonsertunum leygarkvøldið og sunnukvøldið verður Óli Poulsen millum tónleikararnar á pallinum, ávíkavist í Norðurlandahúsinum og Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Óli Poulsen er produsari á fløguni, og hann hevur verið við heilt frá byrjan. Áður hevur hann arbeitt nógv saman við Niclas Johannesen, ið er triði grundarsteinurin undir "Can't Erase It". Á fyrru fløguni hjá Lenu Andersen, ið nevndist "Long Distance", var Óli Poulsen produsari á nøkrum av løgunum, og tá hjúnini gingu við ætlanum um nýggja fløguútgávu, var hann beinanvegin áhugaður.

### 18 dagar í studio

Lena og Niclas høvdu nógv hugskot og nógv løg í skjáttuni, og í eina tíð vóru løg send aftur og fram millum tey bæði og Óla, sum kom við sínum íblástri og hugskotum.

- Eg var sum ein gubbi í Danmark, sigur Óli skemtandi.

Ferð kom á samstarvið, og tey trý gjørdu av at fara í upptøkuhøli saman.

- Fyri at fáa rætta stemningin vildu vit spæla tað nógva saman live í upptøkuhølinum, og tað bleiv so til 18 dagar í upptøkuhøli í Jyllandi í august og september í fjør, greiðir Óli Poulsen frá.

Afturat teimum trimum komu James Olsen og bróðir Óla, Hans Poulsen.

- Vit vildu hava eina føroyska grundstammu á fløguni. Allir tónleikararnir skuldu hava eina kenslu fyri tí, ið vit gjørdu, og vit vildu finna rætta stemningin.

Eftir upptøkurnar í jyska upptøkuhølinum vóru liðnar, arbeiddu Lena, Niclas og Óli víðari við fløguni í upptøkuhølinum hjá Óla í Lyngby í tveir tríggjar mánaðir.

### Dynamikkur

Um samstarvið millum tey trý sigur Óli, at tey arbeiddu tætt saman, men samtíðis vóru tey rættuliga ymisk.

- Sum tónleikarar eru vit rættuliga ymisk, vit hava nógv ymisk hugskot og ætlanir, og tað elvdi stundum til harðar diskussiónir. Men kemi'in var góð, og tí fingu vit vent tað til nakað dynamiskt.

Óli Poulsen greiðir frá, at tey løgdu stóran dent á at koma inn til kjarnan av tí, sum tey øll trý ynsktu við fløguni.

Fyri Lenu og Niclas var sjálvandi talan um eitt rættuliga persónligt projekt - tað var jú teirra fløga, men eisini fyri produsaran var talan um nakað serligt.

- Fløgan gjørdist eitt hjartabarn fyri meg. Eg føldi, at eg brendi fyri sangunum, og eisini brendi eg fyri persónunum aftanfyri. Tað professionella filtrið, ið ofta er millum meg og tónleikararnar, var ikki har. Vit kundu koyra beint á hvønn annan.

- Men framvegis, so skuldu sangirnir ljóða gott, leggur Óli Poulsen afturat.

### Ongantíð nøgdur

Fløgan "Can't Erase It" við Lenu Andersen er tann seinasta í eini langari røð av fløgum, ið Óli Poulsen hevur produserað á yrkisleið síni.

Spurdur, hvørt hann er nøgdur við hesa fløguna, er Óli skjótur at svara.

- Hatta hugtakið finst ikki í mínari verð.

- Hesaferð havi eg gjørt tað á henda hátt, tí eg føldi, at tað eigur at gerast soleiðis, at tað er soleiðis. Men eg stríðist alla tíðina fyri at koma víðari og at gera tað betur og betur. Tað er mín framdrift.

- Um eg hevði funnið tað perfekta - hvat skuldi eg so gjørt, spyr Óli.

Henda hugsanarhátt sær hann als ikki sum stressandi ella frustrerandi. Tvørturímóti. Eftir hansara tykki er hann ein fortreyt fyri framhaldandi kreativiteti.

Óli leggur afturat, at um hann visti, hvussu hann skuldi produsera ta fullkomnu fløguna, so hevði prosessin eftir hansara tykki verið rættuliga keðilig.

### Passión

Óli Poulsen greiðir frá, at tað mest umráðandi er at síggja og hoyra ting. At nýta sansirnar. Og harumframt er tað týdningarmikið at finna gleðina við at síggja nakað positivt.

- Tú mást føla nakað fyri tí, sum tú gert. Hava eina passión. Tað er tað, sum drívur verkið. Tí hví skal ein gera nakað, har passiónin manglar?

- Tá tú klandrast í studio, tí at øll vilja nakað so nógv, so er passiónin til staðar. Og tað skapar eina uppdrift, eina framdrift.

- Men um diskussiónirnar í staðin byggja á ego'ið hjá tónleikarunum, so hendir tað øvugta. So brýtir tú niður, leggur Óli Poulsen afturat.

### Veteran-produsari

Síðan Óli Poulsen flutti til Danmarkar á sumri 1987, er hann blivin eitt rættuliga viðurkent navn á danska tónleikapallinum.

- Eg havi verið heppin at hava havt møguleikan at liva av tónleikinum. Men annars haldi eg tað vera ringt at meta um meg sjálvan. Tað er ringt at vera imponeraður av sær sjálvum, leggur hann skemtandi afturat.

Óli Poulsen nevnir tvey sløg av succes. Har tað hevur gingið gott kommercielt, tvs. har útgávurnar hava selt væl, og har tað musikalska hevur verið gott. Sjálvandi útihýsir tað eina ikki hinum, men allíkavæl.

Fyrst í nítiárunum produseraði Óli Poulsen millum annað tónleik hjá Hanne Boel og Michael Learns To Rock. Seinni komu nøvn sum Big Fat Snake, Dodo And The Dodos, Stig Rossen, Lars H.U.G., Johnny Logan, Michael Learns To Rock (eina ferð enn) og Sanne Samuelson. Men eisini eru útgávur við minni kendum nøvnum, ið hann musikalskt er glaður fyri.

Og við árunum, sum nú eru 40 í tali, hevur Óli Poulsen eisini megnað at fylgja við tí nýggja tónleikinum, ið er komin fram.

- Í bløðunum verði eg viðhvørt nevndur "veteran-produsari", og tá er ikki frítt, at ein kennir seg eitt sindur støvutan. Men í vetur havi eg millum annað arbeitt nógv saman við Julie (vinnarin av Popstars, ið nú rættuliga ger um seg í Danmark, blm.), og tað er stuttligt at bróta ígjøgnum við tí ættarliðnum.

Óli Poulsen kemur inn á spenningin við at arbeiða við nógvum ymiskum tónleikarum.

- Tú veitst ongantíð, hvat fer at henda. Um tað í dag fer at spyrjast nakað rættuliga gott burtur úr arbeiðinum í studio'num. At merkja kensluna av, at her hevur tú fingið nakað rættuliga gott fram - tað er tað, sum ger tað vert at arbeiða víðari.

Hann leggur tó afturat, at tað viðhvørt eru uppgávur, ið einans verða gjørdar fyri pengarnar. Har tað gerst eitt arbeiði sum alt annað.

- Eftir tílíkar uppgávur er tað virkuliga gott at sleppa at arbeiða við uppgávum sum hesari, har tú virkuliga sleppur at leggja kenslur í arbeiðið. Tað gevur orku til at halda fram, sigur Óli og sipar til "Can't Erase It" fløguna hjá Lenu Andersen.

### Á palli

Vanliga spælir Óli Poulsen einans síni ljóðføri heima í upptøkuhølinum í Lyngby, undantikið tá hann av og á jammar við vinunum.

Men um vikuskiftið skal hann so aftur standa á palli. Fyri fyrstu ferð í stívliga 17 ár trínur hann á ein føroyskan tónleikapall. Seinast var á Ólavsøkukonsertini 1987, stutt áðrenn hann flutti til Danmarkar at búgva.

Óli Poulsen tykist lítillátin, men samtíðis óimponeraður, tá hann verður spurdur, hvussu tað kennist, aftur at skula standa á palli í Føroyum eftir so mong ár.

- Harragud, eg skal bara standa har og spæla bass, sigur hann við einum brosi.

Hann leggur tó afturat, at sjálvandi er tað ein stuttligur máti at enda arbeiðið við hesi fløgu uppá.

Eftir framførslurnar fer Óli Poulsen av aftur landinum. Í Lyngby bíðar ein kendur pólskur sangari, ið skal gera nøkur løg í samband við at Pólland alment verður limað inn í ES 1. maj.

Men hóast hann loypir yvir í aðra genru beinanvegin, so verður samarbeiðið við Lenu og Niclas ikki lagt á hillina.

- Her er heilt sikkurt nakað at arbeiða víðari við, staðfestir Óli Poulsen.

Lesið eisini samrøðu við Lenu Andersen í Sosialinum í morgin